# Í FØROYUM

## Føroya Lærara-skúli



Á Føroya Lærararaskúla eru tvær útbúgvingar: læraraútbúgvingin og pedagogútbúgvingin.

Í 2008 fór lærarskúlin undir veingirnar á Fróðskaparsetrinum, og báðar útbúgvingarnar eru nú skipaðar sum bacchelorútbúgvingar. Lesturin er skipaður í lestrarhálvur, og lestarárið byrjar í august.

Tey lesandi eru í skúla tríggjar dagar um vikuna, og tveir dagar eru settir av til sjálvlestur. Fyrstu tíðina hava pedagogar og lærarar undirvísing saman, men verða síðani skild sundur.

Tá BA uppgávan er góðkend eftir trý ár, verður lisið í eitt ár afturat fyri at fáa diplom at arbeiða sum lærari ella pedagogur.

Fortreytirnar fyri upptøku á námsfrøðiligu útbúgvingini eru: at umsøkjarin, umframt at hava gingið 9 ár í skúla, hevur miðnámsprógv, lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika, og harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Fortreytirnar fyri upptøku á læraraútbúgvingina eru: studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi. Dentur verður eisini lagdur á lívsroyndir.

Til ber eisini at sleppa inn á skúlan uttan nevndu fortreytir, um aðrar royndir ella skúlagongd eru í staðin. Mett verður tá í hvørjum einstøkum føri um, hvørt umsøkjarin skal sleppa inn ella ikki.

Skúlin er í Havn og hevur høli saman við Venjingarskúlanum.

www.flsk.fo

## Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya



Í 50 ár hevur verið møguligt hjá føroyingum at útbúgva seg til sjúkrasystur – ella sjúkrarøktarfrøðing, sum tað nú eitur- í Føroyum.

Kjarnin í virkseminum er serliga at útbúgva sjúkrarøktarfrøðingar og at skipa fyri eftirútbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum og heilsustarvsfólkum.

Tað er bert ein sjúkrarøktarfrøðingaskúli í Føroyum, og hann er í Havn. Í ár hevur skúlin 50 ár á baki.

Sjúkrarøktafrøðiskúlin hoyrir nú undir Fróðskaparsetur Føroya, og útbúgvingin er umskipað til eina bachelorútbúgving. Hetta hevur ávísar broytingar við sær, m.a. byrjar skúlin nú í september ístaðin fyri februar, sum áður, tí skúlin skal fylgja universitetsárinum.

Skúlatíðin, sum er 4 ár, hevur verið býtt upp í lestrarhálvur, men eisini her er ein broyting farin fram, tí nú verður skúlatíðin býtt upp í 4 modul árliga, ístaðin fyri 2 lestrarhálvur.

Modulini eru so aftur býtt sundur í ein praktiskan part og ein ástøðiligan part. Fyrst verður gingið í skúla, og so verður farið út á til dømis sjúkrahús og røktarheim at nýta tað í praksis, sum teoriin hevur verið um.

Næmingar verða tiknir inn einaferð um árið, og freistin, sum hevur verið í november, er nú flutt út á várið, eftirsum skúlin ikki byrjar fyrr enn í september. Lýst verður í bløðunum nær søkjast kann.

Bert ein flokkur, umleið 22 næmingar, verða tiknir inn um árið.

Á skúlanum eru 14 lærarar, 1 skrivari og umleið 80 lesandi tilsamans.

Sum sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nógvar møguleikar at útbúgva teg víðari og eisini at arbeiða uttanlands. Eisini er møguleiki at fara í praktikk uttanlands, og tað eru nógv, ið nýta henda møguleika.

www.srfs.fo

## Teknisku skúlarnir í Føroyum



Á teknisku skúlunum verður handverk tvinnað saman við ástøði. Flestu næmingarnir eru lærlingar, sum hava eitt lærupláss, har teir starvast, tá teir ikki eru í skúla. Skift verður millum at verða á arbeiðsplássinum og í skúlanum, longri og styttri tíðarskeið í senn.

Tekniski skúlin í Havn hevur Bildeild, Smiðjudeild, Eldeild, Maskindeild, Stíl & Snið og Timburdeild, har bæði snikkara lærlingar og timburmannslærlingar ganga.

Í Klaksvík hevur Tekniski Skúlin Eldeild, Maskindeild, Snikkaradeild og Timburdeild.

Báðir skúlar bjóða harumframt SIT útbúgving, ið er ein 2 ára long støðisútbúgving. Leysliga kann sigast, at SIT útbúgvingin er allur skúlaparturin av lærutíðini hjá lærlingunum.

Í Havn ber til at velja ímillum træ, el, bil, stíl & snið ella metal. Í Klaksvík ber til at velja ímillum el, maskin ella timbur. Eftir 1. støðisár er møguleiki at fara í handverkslæru og fáa 20–25 vikur eftirgivnar av skúlagongdini, um hetta samsvarar valda økið. Eftir 2. støðisár av SITútbúgvingini er møguleiki at fara undir víðari lesnað, eitt nú til maskinmeistara, el innstallatør, industriel Designer, byggitøkning, framleiðslutøkning, verkfrøðing, arkitekt, designteknolog, o.a.

Tekniski Skúlin í Havn bjóðar eisini fólki at útbúgva seg víðari til Byggitøkning og Framleiðslutøkning, um undirtøka er fyri tí.

Á Tekniska Skúla í Klaksvík er eisini ein HTútbúgving. Hetta er ein trýára long útbúgving, ið serliga er ætlað teimum, ið hava áhuga fyri at arbeiða við tøkni, bæði verkliga og ástøðiliga. Útbúgvingin er skipað við kravdum lærugreinum og vallærugreinum.

www.tst.fo og www.tsk.fo

## Føroya Fólkaháskúli



Háskúlin skipar árliga fyri eini rúgvu av skeiðum.

Høvuðsskeiðið í 2010 varar eina lestrarhálvu. Tað byrjar í august og heldur á inntil desember. Umframt felagstímar og vallærugreinir eru eisini evnisdagar og -vikur við filmi, námsferðum, kreativum verkstøðum og Norðurlandabreyt. Á Háskúlanum ert tú í einum felagsskapi, har lívsroyndir telja líka nógv sum fakligur kunnleiki. Tað er hugurin at læra, sum verður dyrkaður. Tað er eingin próvtøka, og tú skalt vera fylt/ur 17 ár, tá skeiðið byrjar.

Á háskúlanum krevst, at tú rindar eitt skúlagjald fyri vistarhald, undirvísing og námsferðir, men landið letur eina knappa helvt av skúlagjaldinum fyri hvønn næming.

Á várið 2010 skipar Háskúlin harumframt fyri sonevndum stuttskeiðum. Tey eru eftirføðingarskeið, pensjónistaskeið, telduskeið fyri byrjarar, seniorskeið, glasverkstaður, skeið fyri sinnisveik, sjónleikaraskúli, familjuskeið, føroyaskeið/dk, føroyaskeið/no, summarskúlin, og skeiðið Licentia Poetica, har yrkjarar lesa egin orð upp.

www.haskulin.fo